Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin:

# Afturgongdin er prísurin fyri at bera lessið

**- men samgongan heldur støðuna og tað er at fegnast um heldur løgmaður, sum heldur ikki sær nakað alternativ til sitandi samgongu eftir eitt komandi val**

VELJARAKANNING
Jan Müller
jan@sosialurin.fo



Javnaðarflokkurin er taparin í nýggjastu veljarakanningini. Hann gongur aftur við 2,3% í mun til síðsta val. Tað heldur formaður floksins og løgmaður, Jóannes Eidesgaard ikki koma ávart á, tá hugsað verður um, at flokkurin má bera lessið við at standa á odda fyri hesi samgonguni. –Tað er ikki óvanligt, tá talan er um kanningar í einum valskeiði, at flokkar, sum sita í stjórn, verða teir, sum verða lagdir mest undir luppin og oftast hava afturgongd í stjórnartíðini, meðan andstøðuflokkar hava tann lætta leiklutin bara at profilera sín egna politikk og óforpliktandi kunna seta ting fram. Teir eru eisini gjarna í tí leikluti, at teir fáa framgongd. So henda gongdin, har stjórnarflokkar ganga aftur og andstøðuflokkar fram í veljarakanningum í einum valskeiði er fyri mær púra náttúrlig.

Løgmaður staðfestir annars, at samgongan framvegis varðveitir sína støðu við 21 tingmonnum, og tað er hann sum leiðari fyri samgonguna fegin um. Hann heldur eisini, at tað er ein rættvís mynd, tí tað gongur væl í samfelagnum. Tey málini, sum samgongan hevur sett sær, hevur hon í nógvum førum rokkið, og búskaparpolitikkurin, sum varð lagdur til rættis í 2004, byrjar nú at bera frukt.

Jóannes Eidesgaard tulkar annars afturgongdina hjá flokkinum sum eina avleiðing av, at flokkurin ber eitt ávíst less fyri hinar flokkarnar, og tað er so aftur náttúrligt, tí Javnaðarflokkurin leiðir samgonguna, og tað má væl vera tann prísur, sum Javnaðarflokkurin beint nú í hesi kanningini skal gjalda fyri at halda saman uppá tingini. Tað forpliktar at vera leiðsla og taka vit tey málini, sum ikki eru væl móttikin millum fólk, so sum eftirlønirnar til landsstýrismenn, og úrslitið verður, at Javnaðarflokkurin, sum hevur løgmann, rindar ein eyka prís fyri tað.

Uppá fyrispurning um henda kanningin ikki er eitt slag av misálitisváttan til løgmann sigur Jóannes Eidesgaard, at hann her bara kann fyrihalda seg til seinastu kanning, tá spurt var um hvønn persón fólk ynsktu til løgmann. Sjálvur tekur hann ikki nýggju kanningina sum eina misálitisváttan og vísir á, at misnøgdin, sum er, verður kanalyserað gjøgnum Javnaðarflokkin, tí hann hevur leiðsluna. Bæði Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin ganga fríir, tí Javnaðarflokkurin ber lessið fyri teir eisini. Men kanningin sigur javnaðarfólki, at vit fáa ongan valsigur forerandi, vit skulu stríðast fyri hann sigur formaður Javnaðarfloksins.

- Róð hevur verið framundir, at Sambandsflokkurin fyri at fáa løgmann kann velja at fara í eina samgongu við Tjóðveldisflokkin og ein minni flokk eftir næsta val!

- Hondina á hjartað. Eg havi sera ringt við at fáa eygað á eitt annað alternativ til sitandi samgongu.

---

Tórbjørn Jacobsen, Tjóðveldisflokkurin:

# Veljarin ónøgdur við løgmann

**- Tað sker meg í eyguni, at Javnaðarflokkurin, flokkurin við landsins leiðslu, missir so nógva undirtøku millum veljararnar. Tað merkir, at fólk eru ikki nøgd við leiklutin hjá Javnaðarflokkinum og vilja hava eina broyting, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður Tjóðveldisflokkin**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hóast Tórbjørn Jacobsen fegnast um, at Tjóðveldisflokkurin í seinastu veljarakanningini gongur fram við 3,5%, so minnir hann á, at talan bert er um eina kanning.

— Men hetta vísir kortini eina gongd, sum vit eisini sóu við fólkatingsvalinum í fjør, tá Tjóðveldisflokkurin gjørdist største flokkur, sigur hann.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at tað er sjáldsamt, at flokkurin við landsins leiðslu gongur so nógv aftur, sum Javnaðarflokkurin ger í hesi kanningini.

— Tað eru ov nógvir trupulleikar í samgongurni, sum leiðslan ikki fær bilbukt við. Fólk eru eisini troytt av politisku gongdini, tí tað hendir snøgt sagt einki.

Framgongdin hjá Tjóðveldisflokkinu er eini boð frá veljarunum um, at flokkurin higartil hevur gjørt eitt gott arbeiði. Framgongdin er so markant, at hetta eisini eitt signal um, at veljarin ynskir eina broyting í politisku leiðsluna, heldur Tórbjørn Jacobsen.

Tórbjørn Jacobsen vísir á, at um vit — sum vit so ofta gera — bera saman við donsk viðurskifti, so sær man altíð har, at tað er flokkurin, ið hevur forsætisráðharran, sum veksur og veksur.

— Her síggja vit júst tað øvugta, at Javnaðarflokkurin gongur nógv aftur, meðan teir, sum eru rundan um hann halda tørn — Sambandsflokkurin gongur enntá fram!

Hetta heldur Tórbjørn Jacobsen vera uppaftur týðuligari tekin um, at veljarin ikki er nøgdur við leiðsluna, meðan man kanska er nøgdir við tað, sum hinir flokkarnir gera í landsstýrinum.

— Ein ógvuliga sjáldsom støða. Man tosar so ofta um »statsministaraeffektina«, men her virkar hon øvugt, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hóast talan altso »bert« er um eina veljarakanning, sum sigur, hvussu støðan er í teirri løtu, kanningin er gjørd, so vísir eisini á samanfallið millum, at Javnaðarflokkurin minkar og at Tjóðveldisflokkurin veksur.

— Hetta eru flokkar, sum hava eitt ávíst felags veljaragrundarlag, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum eisini vísir á, at nógvir samgongumøguleikar síggjast í hesi veljarakanningin. Eitt er, at fullveldissamgongan aftur hevur meiriluta, annað er, at Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin hava nærum helmingin av veljarunum aftan fyri seg.

---

# Gott at vera anstøðuflokkur

**Bill Justinussen metir, at teirra støða sum anstøðuflokkur hevur havt góða ávirkan á flokkin, tí hann harvið hevur megnað at víst, at teir føra skilagóðan politikk og eru virknir á øllum økjum**

VELJARAKANNING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Til løgtingsvalið seinast hevði Miðflokkurin eina undirtøku uppá 5,2%. Varð tað val í dag, so hevði undirtøkan sambært kanningini verið 6,3%. Tað gevur Miðflokkinum lutfalsliga størst framgongd av øllum flokkunum, og tað er nakað Bill Justinussen fegnast um:

- Ja vit fegnast so avgjørt um kanningina. Serliga tí, at vit nú fyri fyri fyrstu fer í langa tíð, eru omanfyri 5% í eini veljarakanning, sigur næstformaður Miðfloksins.

Sum heild plagar Miðflokkurin at standa seg betri í sjálvum valinum enn í veljarakanningum, men Bill Justinussen torir ikki at siga, um góða úrslitið í kanningini, skal skiljast sum eitt støðumett ella ein tendensur.

Men hvat er tað so, sum er orsøkin til framgongd Miðfloksins?

- Eg haldi, at okkara støða sum anstøðuflokkur kemur flokkinum til góðar í kanningini, og er ein partur av orsøkini. Sum anstøðuflokkur hava vit megnað at víst, at Miðflokkurin førir skilagóðan politikk og er virkin á øllum økjum. Sum samgonguflokkur er tað ikki líka lætt at vera virkin allastaðni, heldur Bill Justinussen.

Sum veljarakanningin vísti, so sigur meir enn helmingurin av veljarunum seg liggja mitt í millum høgru og vinstru. Miðflokkurin er eisini ein flokkur, sum liggur nøkulunda mitt í millum høgru og vinstru. Er tað ein partur av frágreiðingini til góðu úrslitið hjá flokkinum?

- Tað er møguligt, men eg haldi rákið er tað, at allir flokkarnir søkja inn ímóti miðjuni. Men so skal eisini sigast, at Miðflokkurin hevur síni hjartamál, sum ikki eru til at vika. Tað kann bæði vinna, men eisini kosta veljarar, staðfestir Bill Justinussen, varaformaður í Miðflokkinum.

---

# Fólkafloksveljarar velja við heilanum

**Kanningin er frálík fyri Fólkaflokkin og samgonguna, men Javnaðarflokkurin tykist eitt sindur slitin, sigur Óli Breckmann. Hann heldur eisini, at fólkið tekur undir við politikkinum, sum samgongan higartil hevur ført**

VELJARAKANNING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Veljarakanningin vísir, at Fólkaflokkurin hevur eina undirtøku upp á 20,5% millum veljararnar. Hetta er næstan akkurát sama úrslit, Fólkaflokkurin hevði í januar í 2004, tá undirtøkan var 20,6%. VIð øðrum orðum ein afturgongd uppá 0,1%, og hevur tað onga broyting á tingmannatal floksins.

Fleiri av undanfarnu veljarakanningum hava ikki verið mildar móti Fólkaflokkinum, so tí var tað ein væl nøgdur Óli Breckmann, vit fingu orðið á, til eina feska viðmerking til júst kunngjørdu veljarakanningina:

- Hetta var ein frálík kanning fyri Fólkaflokkin og samgonguna. har flokkurin og samgongan varðveitir tingmannatalið. Vit plaga ikki at standa okkum nakað serliga væl í kanningum, so hetta má vera ein ábending um, at tann politikkurin vit føra í løtuni, er á góðari leið, heldur Óli Breckmann.

Málið við Dagmar Joensen og landsstýrismannin í Vinnumálum, Bjarna Djurholm, hevur fylt nógv í fjølmiðlunum seinastu tíðina. Bjarni Djurholm er fólkafloksmaður, men kanningin varð gjørd, áðrenn málið við honum sum høvuðspersóni av álvara tók fer á. Heldur Óli Breckmann, at úrslitið hevði verið øðrvísi, um kanningin varð gjørd í dag?

- Nei tað hevði tað ikki. Fólkafloksveljarar eru fantastiska støðugir og velja við heilanum, so tað hevði ikki broytt nógv. Eg haldi annars kanningin vísir, at førdi búskapar- og skattapolitikkurin, sum hóast útsving, hevur tað gott, fær undirtøku millum veljararnar. Eisini hóvligi sjálvstýrispolitikkurin hevur undirtøku millum fólkið, staðfestir Óli Breckmann, sum vísir á, at tann ónøgdin við samgonguna sum er, kemur Tjóðveldisflokkinum til góðar, men at tað tó ikki hevur ávirkan á tingmannabýtið.

- Tjóðveldisflokkurin er fult mobiliseraður sum er. Javnaðarflokkurin tykist harafturímóti eitt sindur slitin sambært veljarakanningini, sigur Óli Breckmann, sum samstundis vísir á, at tað var tað sama galdandi fyri teir, tá teir sótu sum løgmansflokkur.